# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 5. mars 2021 |
| Mál nr.: | 18/00322 |
| Málsviðgjørt: | AP |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð<br>um<br>ellisakfør**

Við heimild í § 13 a, stk. 2 í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 verður ásett, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 12. desember 2018, verður ásett:

*"Ellisakfar*

**§ 1.** Motorakfar, sum hevur søguligt virði, kann verða allýst sum ellisakfar um:

1) tað er eitt motorakfar við tveimum ásum,
2) tað er 25 ár ella meira,
3) tað er varðveitt í upprunalíki, og
4) tað er skrásett sum ellisakfar.

*Stk. 2.* Húsvognar, viðfestisvognar og lastbilar o.a., sum hava fleiri enn 2 ásar, kunnu ikki skrásetast sum ellisakfør.
*Stk. 3.* Sløkkiliðsbilar eru undantiknir stk. 2.

**§ 2.** Motorakfar, sum eru skrásett sum ellisakfar kann bara nýtast:

1) til serlig høvi, eitt nú flaggdagskoyring, ella
2) til koyring av og á, tá hetta ikki er til óneyðugan vanda ella ónáðir fyri aðra ferðslu.

*Sniðbroytt ellisakfar*

**§ 3.** Sniðbroytt ellisakfar er:

1) eitt motorakfar við tveimum ásum,
2) sum er 25 ár ella meira,
3) hevur eitt so mikið broytt snið og kann tískil ikki skrásetast sum ellisakfar, sbrt. § 1, stk. 1, og
4) er skrásett sum sniðbroytt ellisakfar.

**§ 4.** Motorakfar, sum eru skrásett sum sniðbroytt ellisakfar kann bara nýtast:

1) til serlig høvi, eitt nú flaggdagskoyring, ella
2) til av og á koyring, tá hetta ikki er til óneyðugan vanda ella ónáðir fyri aðra ferðslu.

*Aðrar ásetingar*

**§ 5.** Ellisakfar ella sniðbroytt ellisakfar kann ikki nýtast til vinnuligan flutning ella

aðrar uppgávur, sjálvt um tað ikki er vinnuligt.
*Stk. 2.* Smábussur ella bussur, sum er skrásettur sum ellisakfar, kann ikki verða nýttur til flutning av ferðafólki, sjálvt um tað ikki er vinnuligt.

**§ 6.** Motorakfør, sum lúka krøvini, sbrt. § 1, stk. 1 ella § 2, men har ætlanin framhaldandi er, at hesi akfør skulu nýtast til dagliga koyring, kunnu ikki skrásetast sum ellisakfør.

*Gildiskoma*

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 46 frá 12. juli 2004 um ellisakfør.
*Stk. 2.* Akfør, ið eru skrásett sum ellisakfør, áðrenn henda kunngerð kom í gildi, verða viðgjørd sambært ásetingunum í kunngerð nr. 46 frá 12. juli 2004 um ellisakfør."

Fíggjarmálaráðið, 5. mars 2021

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason